## Bush søguliga samrøðu við Gadaffi



Fyri fyrstu ferð í mong ár hevur ein amerikanskur forseti ringt til libyska einaræðisharran. Tað var í gjár, at George W. Bush, forseti, prátaði í telefon við Moammar Gaddafi. Teir báðir tosaðu um, hvat kann gerast fyri at bøta um viðurskiftini millum USA og Libya, nú Libya hevur goldið 1,5 milliard dollarar í endurgjaldi fyri yvirgang, sum landið er sett í samband við. Pengarnir eru settir í ein grunn, og teir skulu brúkast til endurgjald fyri bumbuatsóknina at einum Pan Amflogfari uppi yvir skotska býnum Lockerbie í 1988 og eina bumbuatsókn nat einum diskoteki í Vesturberlin tvey ár frammanundan.

## Tey klóku flokkast

Meira enn annarhvør akademikari hevur ein akademikara sum besta vin. Fólk við hægri útbúgving vilja helst brúka tíð saman við øðrum fólki við høgari útbúgving, og akademikarar vilja helst eisini hava, at børnini spæla við børn hjá fólki við høgari útbúgving. Tað er úrslitið av einari kanning, sum Capacent Epinion hevur gjørt fyri danska vikubrævið A4. - Í Danmark er ein fortreyt fyri einum góðum vinarlagi, at vit hava somu áhugamál, og her er útbúgving ein týðandi partur – serliga fyri fólk við hægri útbúgving, sigur Karen Lisa Salamon, etnografur, við A4.

# Alt rusk til Havnar

**Elin Lindenskov, forkvinna í heilsu-og umhvørvis nevndini Tórshavnar Býráði, vil hava eina stóra, felags brennistøð fyri allar Føroyar og hon skal vera í miðstaðarøkinum**

LANDSFUNDUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað einasta rætta er at gera eina stóra, felags brennistøð fyri allar Føroyar.

Tað var boðskapurin hjá Elini Lindenskov á landsfundinum hjá Javnaðarflokkinun í Klaksvík nú um vikuskiftið.

Elin Lindenskov er forkvinna í heilsu- og umhvørvisnevndini hjá Tórshavnar Býráð og hon vildi hava umhvørvið á breddan á landsfundinum.

Og hon helt, at tað er ótrúliga týdningarmikið, at Javnaðarflokkurin tekur støðu fyri, at vit fara undir at byggja eina stóra brennistøð, sum skal vera felags fyri alt landið.

Í løtuni hava vit tvær brennistøðir, eina fyri Tórshavnar Kommunu og eina fyri restina av landinum.

- Tær eru báðar javngamlar og tær hava báðar akkurát nú fingið stórar umvælingar og tann í Leirvík skal nú byggjast út.

- Tað, vit hava fingið at vita, er, at eftir umvælingarnar halda tær í 10-15 ár afturat.

Elin Lindenskov sigur, at tað merkir, at um 10-15 ár standa vit við tveimum uppslitnum brennistøðum.

Tí eiga vit longu nú at taka støðu til, at framyvir skulu vit hava eina stóra brennistøð, sum verður felags fyri alt landið.

- Tað tekur drúgva tíð at



*Elin Lindenskov sigur, at tað eru nógvir umhvørvisligir fyrimunir við at gera eina felags brennistøð fyri alt landið og tað mest natúrliga er at leggja hana nærhendis Havnini*

fyrireika og byggja eina stóra brennistøð, men tað fer uttan iva eisini at taka tíð at leggja báðar brennistøðirnar saman.

### Stórir fyrimunur

Sum støðan er nú, verður rusk flutt aftur og fram runt í øllum landinum ístaðin fyri at rationaliserað flutningin og savna alt ruskið á einum staði.

Tað hevði spart nakað av útlátið av vandamiklum evnum.

Elin Lindenskov heldur eisini, at tað er ongin ivi um, hvar ein slíkt brennistøð skal vera

Hon skal vera í Suðurstreymoy og sostatt skal hon vera beint við Havnina, tí er hava øll líka langt at koyra ruskið.

Men upp aftur týdningarmiklari er tað, at í Havn er longu nú eitt undirstøðukervi til eina stóra fjarhitaskipan gjørt, sum 750 húski ov vinnuvirki fyribils eru knýtt upp í.

Og bara tann fjarhitin, vit longu nú hava, sparir okkum 1% av Co2 útlátinum, longu sum er.

Samstundis er hetta mitt í landinum, so flutningurin verður so stuttur sum gjørligt hjá øllum.

Tær báðar brennistøðirnar, vit nú hava, eru ov lítlar, men ein felags brennistøð hevði verið so mikið stór, at tað hevði borið til at vunnið streym úr hitanum og tí er tað ein fyrimunur at byggja hana við SEV-verkið á Sundi.

Sostatt heldur hon, at tað hevði verið nógvir umhvørvisligir fyrimunir við at gjørt eina felags brennistøð, segði Elin Lindenskov.

- Hetta er ein spurningur, sum vit mugu taka støðu til sum skjótast, staðfesti Elin Lindenskov.

### Einasta rætta

Vilhelm Johannesen, sum var formaður í Føroya Kommunufelag, tá ið brennistøðin í Leirvík varð bygt segði, at longu tá var ætlanin at gera eina brennistøð.

- Tað hevði gjørt ætlanina nógv rationellari, samstundis sum tað hevði givið nógv størri møguleikar at gagnnýtt avlopshitan.

Men Býráðið í Havn setti alt ov harðar treytir við at krevja meirilutan í nevndini fyri brennistøðina og sostatt ræðisrættin á henni og tað vildu Kommunufelagið ikki góðtaka.

Hann heitti staðiliga á allar partar um at taka undir við hugsanini um at byggja eina felags brennistøð fyri alt landið.

Men Vilhelmi so líkt, var eisini stundir til skemt:

- Tey vilja kráma alt inn undir seg í Havnini, so kunnu tey eisini fáa lortin, helt hann.

---

skuldi bíða til regluliga landsfundin, sum var í Klaksvík um vikuskiftið.

### Allar ósemjur lagdar afturum

Men tann, sum hevði bíðað eftir eini uppgerð í Javnaðarflokkinum á landsfundinum, bíðaði til fánýtis, tí á landsfundinum varð tvídrátturin um Gerhard Lognberg ikki tikin upp á tunguna yvirhøvur.

Sjálvur hevði Gerhard Lognberg orðið reiðiliga tíðliga á landsfundinum og tá staðfesti hann, at allar ósemjur ímillum hann og restina av flokkinum, vóru lagdar aftur um og tað fegnaðist hann um.

Hann sigur, at hann følir seg væl í tingbólkin um nú.

Men hann sigur eisini, at ein høvuðsorsøk til tað er, at CHE samgongan slitnaði og at ABC samgongan varð skipað í staðin.

- CHE samgongan skeyt Sandoyartunnilin í senk, so eg eri í hvussu so er ikki ein av teimum, sum harmist um, at hon fór fyri bakka, sigur hann.

Samstundis følir hann seg nógv tryggari við, at Sandoyartunnilin verður veruleiki við hesi nýggju ABC samgonguni.

- Tað eydnaðist at fáa Sandoyartunnilin við í samgonguskjalið við ítøkiligum orðingum og tað hevur givið mær nýggja vón, tí eg havi álit á, at samgongan er sinnað at fullføra tað, sum stendur í samgonguskjalinum, staðfestir Gerhard Lognberg.

Samstundis ger hann púra greitt, at tað er framvegis eitt treytaleyst krav, at farast skal undir Sandoyartunnilin í 2011.

## Toppurin tann sami

**Ongar broytingar vórðu gjørdar í leiðsluni í Javnaðarflokkinum á landsfundi um vikuskiftið**

Eftir landsfundin í Javnaðarflokkinum um vikuskiftið, er tað greitt, at ovasta leiðslan í flokkinum verður tann sama hetta næsta árið, sum hon hevur verið hetta síðsta árið.

Longu frammanundan var tað greitt, at Jóannes Eidesgaard fór at halda fram sum formaður, tí valevni til starvið sum formaður, skuldi vera flokkinum í hendi í seinasta lagi tríggjar vikur undan landsfundinum og tá í onki uppskot kom inn, varð greitt, at Jóannes Eidesgaard heldur fram hetta næsta árið.

Men veljast skulu eisini tveir næstformaður og teir skulu vera hvør sítt kyn. Tey, sum hava røkt hesi bæði størvini, eru Randi í Jógvansstovu í Leirvík og Petur Páll Mikkelsen úr Gøtu og tað var heldur ongin, sum bjóðaði teimum báðum av, so tey halda fram.

Men so skuldu eisini tríggir limir veljast í starvsnevndina. Tey trý, sum manna starvsnevndina, eru Maud Næs úr Hvalba, Kristian Magnussen úr Havn og Eyðgunn Samuelsen úr Klaksvík og tey vórðu somuleiðis afturvald, men her skuldi val til, tí William Sand Davidsen á Sandi og Ann Elisabeth Joensen úr Havn vórðu eisini í uppskoti til starvsnevndina, men hvørgum eydnaðist at verða vald

**-áki-**

## Grundgeving fyri einum valdømi helt ikki

**Jóannes Eidesgaard ásannar nú, at ein høvuðsorsøk til at skipa allar Føroyar í eitt valdømi, hevur neyvan hildið**

Tá ið alt landið varð skipað í eitt valdømi, førdu tey, sum tóku undir við málinum, ofta og títt fram, at tað skuldi vera ein stórur fyrimunur, tí tað fór at beina fyri lokalpolitikkinum, sum var mettur at vera av tí ónda.

Men á landsfundinum hjá Javnaðarflokkinum um vikuskiftið, ásannar, Jóannes Eidesgaard, formaður floksins, at hendan grundgevingin hevur neyvan hildið.

- Ongantíð áður hevur lokalpolitikkurin verið meira í fokus enn júst í tíðini eftir valið, staðfesti hann á landsfundinum.

Hann sigur, at ein onnur avleiðing av broytingini hevur verið, at valstríðið og tíðin eftir valið hevur víst, at løgtingsfólk í nógv størri mun hava brúk fyri at koma sær fram í fjølmiðlum, tí nú berjast jú øll móti øllum.

- Hetta hevur síðan aftur víst seg í stórari ónøgd í sjálvum valstríðnum, tí at nøkur eru sloppin meira framat fjølmiðlunum enn onnur. Hetta er ikki ein trupulleiki, sum bert vit í Javnaðarflokkinum eiga, men er hetta galdandi allar teir stóru flokkarnir, segði Jóannes Eidesgaard.

**-áki-**